
LM-103/2025

Kortlegging & portraskanning



Fundur í Vinnunevndini

Tórshavn 12. mai 2026

Kortlegging sbrt. FSL § 58a – Status 12.05.26

- Skipan er gjørd til skráseting
  - Trygt umhvørvi er gjørt, og er klárt at verkseta
  - Analysuparturin verður gjørdur í løtuni
- Skráseting, 2 persónar:
  - 7 eindir “liðugt” skrásettar
  - 2 eindir partvís liðugt skrásettar
  - 11 eindir eru ávegis við skráseting
  - Jalig afturmelding frá fleiri av eindunum: tær fáa sjálvar nógv burturúr skrásetingini
- Endamál: styrkja kreppustýringina
  - Skapa gjøgnumskygni og yvirlit
  - Avdúka veikleikar ella viðbrekni
  - Eggja til fyribyrgjandi tiltøk
  - Amboð til raðfesting av tiltøkum í eini kreppustøðu
  - Íkast til og grundarlag fyri tilbúgvingarvenjingum
  - Skapa tilvitan um veikleikar, viðbrekni og nettrygd hjá teimum, sum varða av samfelagstýðandi undirstøðukervi

Fjarskiftiseftirlitið

Portraskanning sbrt. FSL § 58a – Status 12.05.26

- Portraskanningar framdar regluliga frá medio 2025
- Halda veikleikar og viðbrekni úr Shadowserver upp ímóti úrslitum av portraskanningum
  - Mangla resursir til greiningar
- Úrslit: kunning um veikleikar send 28 fyritøkum og stovnum
  - Dátugrunnar, sum eru atkomiligir á internetinum
  - Opið portur til fjarskrivaraborð (RDP)
  - Innanhýsis stýring av netum (SNMP)
  - Stýring av vatnverki og fabriksmaskinu, sum var atkomilig beinleiðis frá internetinum
  - Avoldaðar skipanir, sum ikki longur móttaka trygdardagføringar
  - Trygdarveikleikar á netúgerð so sum routarum og firewalls